EYSTURSKÚLIN TÓRSHAVN

# Lærarastarv í Eysturskúlanum

Eysturskúlin søkir eftir lærara í tíðaravmarkað starv fyri lærara í barnsburðarfarloyvi at byrja sum skjótast og skúlaárið út.

Starvið eru lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.
Talan er um eitt fult starv við 25 undirvísingartímum um vikuna.

Viðkomandi skal undirvísa í 9. flokki í støddfrøði, føroyskt, enskt í 5. flokki. Í hesum starvi er neyðugt, at tú ert til reiðar at arbeiða í tøttum samstarvi í sjálvstýrandi toymið í 4. – 5. flokki. Ítróttur og evning eru eisini á tímatalvuni.

Starvið eru lønt í lønarflokki 18.1 –27.4 sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

**Í Eysturskúlanum leggja vit dent á:**
- Í undirvísingini at taka støði í teimum mongu førleikunum
- At leita eftir sterkum síðum hjá næminginum
- At tollyndi skal verða grundleggjandi fyri alt okkara virksemi

**Søkt verður eftir lærara sum:**
- hevur læraraútbúgving
- dugir væl at samstarva og samskifta
- áhaldandi vil menna seg sjálvan og skúlan
- ikki ræðist nýggjar avbjóðingar
- setir tollyndi í hásætið

**Umsóknir:**
Umsóknir við avriti av prógvi, CV og møguligum viðmælum skulu verða skúlanum í hendi **í seinasta lagi mánadagin 14. januar**

Meira fæst at vita um starvið við at seta seg í samband við skúlastjóran, Eyðdis Eidesgaard á tlf. 302540 ella 214752

**Eysturskúlin**
**Tórgarðsgøta 17**
**100 Tórshavn**

# Gøtu kommuna

## KUNNGERÐ

**Samb. kunngerð nr.109, frá 7. des. 2007 fer løgtingsval fram leygardagin tann 19. januar 2008 í samkomuhøll skúlans við Gøtugjógv.**

Atkvøðugreiðslan byrjar kl. 10.00 og heldur fram til kl. 20 ella so leingi veljarar møta uttan steðg.

**Brævatkvøður:**
Veljarar, ið verða burturstaddir valdagin, kunnu í seinasta lagi dagin fyri valið, **tann 18. jan. 2008,** greiða brævatkvøðu við at venda sær til fólkayvirlitið / kommunuskrivstovuna. Brævatkvøður skulu verða valstýrinum í hendi innan valið byrjar kl. 10.00 tann 19. januar 2008.

**Heimaval:**
Veljarar, ið vegna sjúku ella annað ikki kunnu koma á valstaðið, kunnu velja heima frá **12. jan. 2008 til og við tann 18. jan. 2008** við at boða frá til kommunuskrivstovuna - helst innan **kl. 15 fríggjadagin tann 18. januar 2008.**

**Valkort:**
Vart verður gjørt við, at valkort skulu nýtast til valavgreiðsluna.

Hesi verða send út við postinum til allar løgtingsveljarar, ið standa á vallistanum. Um onkur, ið heldur seg hava atkvøðurætt, ikki hevur fingið valkort, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, skal verða sagt kommmunuskrivstovuni frá sum skjótast.

**Minnist vinarligast til at hava valkortið við á val.**

Valstýrið í Gøtu, 3. januar 2008.
Måns Persson, form.

# PEDAGOGAR TIL DAGSTOVNIN Í FUGLAFIRÐI

**Søkt verður eftir pedagogum til vøggustovu og barnagarðstovu.**
**Byrjað verður 1. februar 2008 ella eftir nærri avtalu.**

Tvey pedagogstørv á 40 t. viku í barnagarðsstovu.
Eitt pedagogstarv á 30 t. viku í barnagarðsstovu.
Eitt pedagogstarv á 40 t. viku í vøggustovu.

Dagstovnurin er skipaður í tvey hús við eini barnagarðstovu og eini vøggustovu í hvørjum húsið. Dagstovnurin sum er ætlaður til 76 børn byrjaði í 1991 og í 2006 varð dagstovnurin útbygdur við einari stovu.

**Vit sóknast eftir pedagogum sum:**
- hevur fakliga royndir og vitan, sum kann nýtast í dagliga arbeiðnum.
- sær møguleikar fram um mørk og tolir broytingar.
- kann arbeiða sjálvstøðugt, er førir fyri at orða seg skrivliga.
- er eldhugaður, jaligur og hevur góð samstarvsevnir

**Vit kunnu bjóða tær :**
- fjølbroyttar arbeiðsuppgávur.
- eitt starv, har tú kanst brúka tína dygdir, hava ávirkan og samstundis menna teg sjálvan.
- samstarv við NSR tænastu, náms-og sálarfrøðilig ráðgeving, sosialu deild og stovnar hjá Fuglafjarðar kommunu.

**Setanartreytir:**
Løn eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til leiðaran í dagstovninum, Juliannu Næs á tlf. 737780.
Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu verða **Býráðskrivstovuni, Norður í Gerði 10 b, 530 Fuglafjørður** í hendi í seinasta lagi **21. januar 2008 kl. 10.00**

Møguligar setanarsamrøður verða í viku 4.
Kommunan skilir sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknirnar ella onga at taka.

**Fuglafjarðar Kommuna**

INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

**Stuðul av játtanini til umhvørvisverndartiltøk**

Innlendismálaráðið umsitur eina játtan, hvørs endamál er at stuðla tiltøkum

- sum menna vitanina um umhvørvið og/ella náttúruna
- sum virka dálkingarfyribyrgjandi og/ella -avmarkandi
- sum verja landsløg, djóra- og/ella plantusløg
- sum kunna almenningin um umhvørvis- og/ella náttúruviðurskifti

Umsóknarblað, kunning og reglugerð fæst á www.imr.fo ella við at venda sær til Innlendismálaráðið.

**Umsóknarfreistin er 1. februar 2008**

Umsóknir skulu sendast til:

**Innlendismálaráðið**
Postboks 159
110 Tórshavn

INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

**Stuðul av játtanini til frama fyri viðarvøkstur**

Innlendismálaráðið umsitur eina játtan, hvørs endamál m.a. er at stuðla viðarvøkstri til tess at fríðka um lendi, skapa lívd og rekreativ økir, umframt at verja ímóti jarðarmáan.

Umsóknarblað, kunning og reglugerð fæst á www.imr.fo ella við at venda sær til Innlendismálaráðið.

**Umsóknarfreistin er 1. februar 2008**

Umsóknir skulu sendast til:

**Innlendismálaráðið**
Postboks 159
110 Tórshavn

**Klaksvíkar Sjúkrahús**
FO-700 Klaksvík

**Ortopædkirurkiskur skomakari og bandagistur frá SAHVA,**
verða á Klaksvíkar Sjúkrahúsi 29. jan. 2008 og á Landssjúkrahúsinum 03.-31. jan. og 1. feb. 2008

Tíð fæst við at ringja á tlf. 45 45 45, **mánadag - týsdag kl. 10.12,** í seinast lagi týsdagin 22. jan. 2008